# Violin- og klaverspælarar vitja

**Hesa vikuna vitja Serguei Azizian, violinspælari úr Keypmannahavn og Marianna Shirinyan, klaverspælari úr Esbjerg Føroyum. Konsertir og verkskeið verða hildin í hesum sambandi**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Í vikuni fáa vit í Føroyum vitjan av tveimum tónleikarum, sum til dagliga búgva og virka í hvør sínum herðashornið í Danmark: Violinspælarin Serguei Azizian úr Keypmannahavn og klaverspælarin Marianna Shirinyan úr Esbjerg. Tey eru bæði fødd og uppvaksin í Yerevan í Armeninen, har tey eisini fingu sína fyrstu tónleikaútbúgving. Aftaná framhaldandi lesna í Sct. Petersburg og í Hamburg starvast tey nú bæði í Danmark.

Serguei Azizian hevur seinastu 16 árini verið konsertmeistari í Sjællands Symfoniorkester og hevur eisini verið nógv frammi innanfyri kamartónleik. Hann hevur spælt sum solistur saman við fleiri ymiskum symfoniorkestrum, verið limur í kamartónleikarabólkum og spælt inn á CD saman við Sjællands Symfoniorkstri. Eisini frálæra í violinspæli hevur Azizian áhuga fyri. Hann er nú professari á Kongiliga Musikkonservatoriðinum í Keypmannahavn. Mikudagin kl. 16-18 fer Azizian at undirvísa ávísum næmingum í Atelienum hjá Eivindi Mohr Lützenstrøð nr.12. Øll eru vælkomin.

Marianna Shirinyan hevur verið klaverspælari í vælumtókta tónleikarabólkinum Esbjerg Ensemble síðan 2003 og undirvísir eisini á Kgl. Konservatoriðinum í Keypmannhavn. Hon hevur fleiri ferðir vunnið fyrsta plássið í internationalum klaverkappingum bæði sum solistur og sum kamartónleikari.



*Marianna Shirinyan, klaverspælari úr Esbjerg*

Í vikuni fara hesir báðir framúr góðu tónleikararnir at hava konsert í Mentunarhúsinum í Fuglafirði hóskvøldið kl. 19.30 og í Norðurlandahúsinum fríggjadagin kl. 17. Atgongumerki á 100 kr. kunnu við inngongdina. Øll lesandi sleppa inn fyri einki.

**Tíðarætlan:**
**Mikudag 17. september:** Azizian kemur
Verkskeið klokkan 16 –18 Eivindurs Atelier Lützenstrøð nr. 12
Undirvísing av næmingum á Tórshavnar Musikkskúla
**Hósdag:** Shirinyan kemur
Hóskvøldið klokkan 19.30 konsert í
**Mentunarhúsinum í Fuglafirði:**
Fríggjadagin klokkan 17 konsert í Norðurlandahúsinum í Havn.


STARVSLÝSING

## Handverkarar/arbeiðsmenn til Landsverk

Søkt verður eftir tveimum handverkarum/arbeiðsmonnum til nýggjan arbeiðsbólk á vegadeildini á Landsverki, ið skal taka sær av viðlíkahaldi av brúm og tunlum.

Landsverk er landsvegamyndugleiki, og høvuðsuppgávan hjá vegadeildini er at fyrireika, kravfesta, góðkenna, byggja, viðlíkahalda og reka landsvegirnar, herundir at sýna og umvæla tunlar og brýr. Deildin hevur eisini um hendi vetrarhald, herundir at kanna og fráboða koyrilíkindi, salta fyri hálku og at rudda landsvegirnar fyri kava. Harafturat umsitur vegadeildin ferðslumál og tilbúgving.

Arbeiðsuppgávur
Høvuðsuppgávan hjá nýggja arbeiðsbólkinum er at fyrireika og fremja eitt skipað viðlíkahald av brúm og tunlum, ið Landsverk varðar av. Fasta møtistaðið er á verkstaðnum í Kollafirði, men arbeitt verður um alt landið, so ferðing er partur av arbeiðinum. Stundum kann eisini roknast við longum døgum og nakað av náttararbeiði.

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir handverkarum/arbeiðsmonnum við útbúgving og/ella royndum í tunnils-, brúgva- og betongarbeiði. Røttu persónarnir við áhuga fyri nevnda virkisøki fáa møguleikan at menna seg í yrkinum við viðkomandi upplæring.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, lívsgongdarlýsing (cv) og møguligum ummælum skulu sendast til

Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn
lv@lv.fo

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 22. september 2008. Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Sigurd Lamhauge, tel. 540 889, sila@lv.fo, ella til Mikkel Heide Frandsen, tel. 540 882, mhf@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herímillum tyrlupallar.*


# Ráðstevna um orðblindi skal gera mun

ORÐBLIND
*Tíðindaskriv*

Hósdagin 18. september verður ein stór ráðstevna á Hotel Føroyum um orðblindni. Endamálið við ráðstevnuni er at fokusera á, hvat kann og eigur at gerast, so orðblindir skúlanæmingar kunnu fáa fakliga nyttu av sínum skúlaárum, hóast teir eru orðblindir

Orðblindni er rættiliga vanligt, eisini í Føroyum, men tey fægstu munnu geva sær far um, at umleið fimm prosent av øllum føroyingum eru orðblindir og at tvey prosent av øllum føroyingum hava enntá stórar trupulleikar av sínum orðblindni.

Nú hevur Lions Club Tórshavn saman við millum annað Mentamálaráðnum tikið stig til eina stóra ráðstevnu um orðblindni, sum verður á Hotel Føroyum hósdagin 18. september frá klokkan 9 til 16, har fakfólk fara at hava fyrilestrar og kunna um orðblindni.

Yvirskipaða endamálið við ráðstevnuni er at fokusera á, hvat kann og eigur at gerast, so orðblindir skúlanæmingar kunnu fáa fakliga nyttu av sínum skúlaárum, hóast teir eru orðblindir. Tí hóast orðblindni er ein stórur trupulleiki, ber væl til at gera nakað við tað.

Millum annað kann staðfestast við einari kanning, um lesi- og skrivitrupulleikar botna í orðblindni, og tað ber eisini til at geva bæði skúlanæmingum og vaksnum við hesum trupulleika hjálp, so tey annaðhvørt læra at lesa og skriva ella á annan hátt fáa atgongd til fakliga vitan.

### Hjálp til orðblind

Tað er Lions Club Tórshavn, sum hevur tikið stig til ráðstevnuna, ið millum annað fær undirtøku frá Mentamálaráðnum. Árliga listaframsýningin í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku gav í ár 70.000 krónur, sum burturav fara til ráðstevnuna um orðblindni.

– Okkara tanki er at seta nakað í gongd, so orðblindni verður tikið í størsta álvara, har tað veruliga ber til at gera nakað, sum kann muna. Allarbest hevði verið, um henda ráðstevnan kundi gjørt, at sett vóru nøkur mál og tikin nøkur stig, so orðblind í Føroyum kunnu fáa hjálp, sigur Rasmus Magnussen, sum vegna Lions Club Tórshavn er ein av stigtakarunum.

– Orðblindni viðkemur so mongum, bæði teimum orðblindu, foreldrum og familju teirra, lærarum og øðrum, tí eru vit í nøkulunda somu støðu sum londini rundan um okkum, eru útivið túsund føroyingar orðblindir og kunnu fáa eitt heilt annað lív, verður nakað gjørt fyri at hjálpa upp á trupulleikan.

Rasmus Magnussen sigur, at tað hevði verið ynskiligt, um ein arbeiðsbólkur kundi arbeitt burturav við orðblindni, so neyðug átøk vóru sett í verk. – Endamálið við ráðstevnuni er at seta nakað í gongd, og tað vóna vit, at bæði politikarar, skúlafólk og onnur vilja viðvirka til, sigur hann.

### Fakligir fyrilestrar

Á ráðstevnuni fer leiðarin á danska orðblindnistovninum í Ballerup, Karl Åge Andreasen, at tosa um, hvussu tað ber til at skipa og fremja eina serliga tilrættislagda serundirvísing fyri orðblind. Í fyrilestrinum leggur hann dent á, hvat skal gerast og hvussu úrslit skulu røkkast.

Somuleiðis fer leiðarin fyri vaksnamannaorðblind niskúlan í Albertslund, Hans Pauli Christiansen, at greiða frá royndum sínum frá undirvísing av vaksnum orðblindum, og hann fer eisini at koma inná, hvussu orðblind kunnu fáa eina útbúgving og standa seg á arbeiðsmarknaðinum.

Halgerð Hansen, lesikonsulentur, fer at greiða frá sínum royndum í Føroyum við serundirvísing fyri børn og vaksin við lesi, skrivitrupulleikum og orðblindni, og sama evni fer leiðarin á Alv-skúlanum við Áir, Maibritt Holm Andersen, at viðgera.

Formaðurin fyri felagið fyri lesi- og skriviveik, Anne Karin Kjeld, fer síðani at greiða frá arbeiðinum fyri orðblind, áðrenn ráðstevnan endar við einum pallborði, har bæði leik og lærd fara at siga frá og annars svara spurningum.

Ráðstevnan er almenn og kostar 200 krónur fyri hvønn, íroknað mat og drekka. Tilmeldingin fer fram á Hotel Føroyum.